tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 27.11.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 87/25 | 25/00177-1 | Skúlastýrið -árligur fundir við skúlastýrið 2025 |
| 88/25 | 25/00501-2 | Mýrifípan -barnaansingin og summarferia 2026 |
| 89/25 | 25/00433-1 | Læknamiðstøðin -dagføring/nýtt inbúgv |
| 90/25 | 25/00412-2 | Tvøroyrar Fimleikafelag (TF) -umsókn um stuðul til útgerð og amboð 2025 |
| 91/25 | 25/00413-2 | TB-Flogbóltur -umsókn frá TB Flogbóltið, um stuðul til kappingarárið 2025/26 |
| 92/25 | 25/00448-2 | Áhugafelagið "Nýggjárshaldið á Tvøroyri"<br>Umsókn um stuðul til nýggjárshald 2025/26 |
| 93/25 | 25/00446-1 | Fíggjarætlan 2026 |
| 94/25 | 25/00529-1 | FÆ2025 -Eykajáttanir flytingar millum íløgu- og rakstrarstøð |
| 95/25 | 25/00530-1 | Býráðsfundir -fundardagar í 2026 |
| 97.1/25 | 25/00138-20 | Umsókn um byggiloyvi til trafostøð í Froðba - frávik frá byggisamtyktini |
| **Til kunningar** | | |
| 30/25 | 25/00029-1 | Skattainntøkur 2025 |
| 31/25 | 25/00445-1 | Cruise-ferðavinna - ferðamannaskip |

| | | |
|---|---|---|
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin og kunnar um at tvey mál eru komin aftur at skránni, eftir at skráin bleiv  kunngjørd alment.

| | |
|---|---|
| 25/00529 | FÆ2025 -Eykajáttanir flytingar millum íløgu- og rakstrarstøð |
| 25/00530 | Býráðsfundir -fundardagar í 2026 |
| 25/00138 | Umsókn um byggiloyvi til trafostøð í Froðba - frávik frá byggisamtyktini |

Kristin Michelsen spyr um viðmerkingar eru til skránna – ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 87/25
## 25/00177-1 Skúlastýrið -árligur fundir við skúlastýrið 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.05.2025 | 27/25 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 87/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.04.2025**
Avtala er gjørd við forkv. í skúlastýrinum at møta til fundin at greiða frá arbeiðinum í skúlastýrinum. Mælt verður til, at fundurin gevur íblástur og tørvslýsing til inniverandi ár og viðvirkar til rakstrar- og íløgujáttanir til fíggjarætlan hjá Tvøroyrar kommunu 2026.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2025-26**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Varaborgarstjórin greiddi frá um fundin við Skúlastýrið sum var beint áðrenn býráðsfundin.
M.a. fekk nýggja bussskýlið í Trongisvági rós, og eisini framhaldandi arbeiðið við at betra um ferðslutrygdina við skúlan í Trongisvági. Har vóru eisini fleri ynski, sum arbeitt verður við.

**Kommunustjórin 04.11.2025:**
Skúlastýrið er boðið á fund við býráðið 27. november 2025.

**Býráðið 27. november 2025:**
Skúlastýrið møtti til fundin og avtala var at hava fund aftur 26. mars 2026.

**88/25**
**25/00501-2 Mýrifípan -barnaansingin og summarferia 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.11.2025 | 45/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 128/25 |
| 3 Býráðið | 27.11.2025 | 88/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 7. Nov. 2025**
Leiðarin av Mýrifípuni hevur vent seg tilumsitingina við áheitan um, at endurskoða upplatingar tíðirnar hjá Mýrifípuni og við tilmælið um at steingja barnaansingin í 3 vikur komandi summar 2026.

**Kari Joensen, leiðari skrivar ma.:**
Frágreiðing og tilmælið um broyttu upplatingartíðirnar, og tilmælið um at Myrifípan hevur stongt, summar 2026.

**Broyttu upplatingartíðirnar**

*26. juni 2025 samtykti Tvøroyrar býráð, at Mýrifípan skuldi lata upp kl. 6.30. um morgunin. Vit hava funnið eina loysn í barngarðinum ið virkar, men tað eru ikki nógv foreldur ið hava tikið av tilboðnum.*
*Eitt barn er møtt kl 6.30, hvønn morgun síðani tænastan byrjaði.*
*Trý onnur børn eru møtt av og á, eitt barn 6 ferðir og hini tvey 10 ferð, frá 14.august til d.d.*
*Broyttu upplatingartíðinar hava við sær, at tvey starvsfólk møta 1 tíma fyrr og fara heim 1 tíma fyrr enn vanligt.*

*Tá vit byrjaðu við broyttu upplatingartíðunum vantaðu vit ikki at nakað barn fór at koma hvønn morgun. Tað at eitt barn kemur hvønn morgun ávirkar stovurnar sera nógv.*

*Broyttu upplatingartíðinar skapa ónøgdsemi ímillum starvsfólkini. Tey halda at tað ávirkar meiri børn neiligt, heldur enn tað gagnar børnum. Broyttu upplatingartíðirnar ávirka eisini nøkur starvsfólk privat, tey fáa ikki gerandisdagin at hanga saman.*

*Starvsfólk og leiðsla mæla frá at broyttu upplatingartíðirnar halda fram.*

**Summar 2026**

*Seinastu tvey árini hevur Mýrifípan havt stongt 3 vikur um summari. Frítíðarskúlin hevur longt upplatingartíðirnar 3 vikur. Frá seinast í juni og til barnagarðurin letur aftur, kunnu børn koma í frítíðarskúla frá kl. 7.30 til kl. 17.00 hvønn dag.*

*Leiðarin mælir til at steingja barnaansingin 3 vikur komandi summar, eins og hevur verði gjørt í 2023 og 2024.*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevndi og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Sosiala nevnd 12. november 2025:</u>**
Kari Joensen leiðari av Mýrifípuni møtti til fundin.

**Tilmælið um upplatingartíði:**
Kari Joensen greiddi frá støðuni í Mýrifípuni í samband við broyttu upplatingartíðirnar, sum Tvøroyrar býráð samtykti 26. juni 2025, har barnagarðurin skuldi lata upp kl. 6.30 á morgni.

Leiðarin upplýsti, at hóast loysn er funnin fyri fyrra upplatingartíð, hevur eftirspurningurin verið avmarkaður. Bert eitt barn møtir hvønn morgun kl. 6.30, meðan trý onnur børn hava nýtt tilboðið av og á. – í alt 16 ferðir frá 14. august til dags dato.

Tvey starvsfólk møta nú ein tíma fyrr og fara ein tíma fyrr heim. Hetta hevur tó víst seg at ávirka dagliga arbeiðið og trivnaðin í starvsfólkahópinum neiliga.

Starvsfólk og leiðsla í barnagarðinum meta, at broyttu upplatingartíðirnar ikki gagna børnum í sama mun sum tær ávirka tey neiliga. Harumframt hava nakrir starvsfólk torført við at fáa sín gerandisdag at hanga saman orsakað av nýggju tímunum.

Tí mælir leiðslan og starvsfólkini frá at halda fram við broyttu upplatingartíðunum.

**Tilmæli um at Mýrifípan verður stongd í 3 vikur um summarið 2026**
*(Bjarni Hammer var ikki við til hesa viðgerðina)*
Kari Joensen greiddi á fundinum frá tilmælinum um, at barnagarðurin Mýrifípan verður stongdur í 3 vikur um summarið 2026, eins og tað hevur verið skipað seinastu tvey árini, í 2023 og 2024.

Hon greiddi frá, at fyriskipanin hevur riggað sera væl bæði fyri børn, foreldur og starvsfólk. Í tíðarskeiðinum, tá Mýrifípan hevur verið stongd, hevur Frítíðarskúlin havt longdar upplatingartíðir frá kl. 7.30 til kl. 17.00 hvønn dag, soleiðis at børnini hava havt eitt trygt og støðugt tilboð.

Leiðarin vísti á, at henda skipan gevur starvsfólkunum møguleika at fáa samanbundna summarferiu, sum hevur stóran týdning fyri trivnað og arbeiðsumhvørvi. Samstundis tryggjar hon eina smidliga fyrisitingarliga loysn, har børnini framvegis hava eitt tilboð í samstarvi við frítíðarskúlan.

Kari Joensen mælir tí til, at henda skipan verður at halda fram komandi summar 2026.

**Samtykt um at Mýrifípan verður stongd í 3 vikur um summarið 2026:**
*(Bjarni Hammer var ikki við til hesa viðgerðina)*
Forkv. mælir til, at fylgja tilmælinum um at Mýrifípan verður stongd í 3 vikur um summarið 2026 - **einmælt samtykt.**

**Samtykt um upplatingartíði:**
Forkv. mælir til, at málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á næsta fundi í Sosialu nevnd.
**einmælt samtykt.**

**Fíggjarnevndin 20. november 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá sosialunevnd at Mýrifípan verður stongd í 3 vikur um summarið 2026.

**Býráðið 27. november 2025:**
Borgarstjórin mælir til at býráðið samtykkir tilmælið hjá sosialunevnd og fíggjarnevndi at fylgja uppskotið hjá leiðara og starvsfólkum í barnagarðinum, at hesin stongir 3. mðr. um sumrarnar.
**Atkvøtt verður:** 5/0/2 -**Uppskotið er samtykt**
Fyri/ímóti/blankt
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard og Arnfinn Bech
**Ímóti: Ongin**
**Blankt:** Bjarni Hammer og Barbara Tausen

**89/25**
**25/00433-1 Læknamiðstøðin -dagføring/nýtt inbúgv**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 23.09.2025 | 35/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 103/25 |
| 3 Býráðið | 29.09.2025 | 70/25 |
| 4 Býráðið | 27.11.2025 | 89/25 |

**Málslýsing:**
**Kommunustjórin 16.09.2025**
Starvsfólkini í læknamiðstøðini hava gjørt vart við ynskið um dagføring av innbúgv.

> ***Innbúgv***. *-vit tosaðu um nýggj elevatións skrivaraborð. Talan er um trý nýggj borð. Tvey til læknarnar og eitt til nýsettan sjúkrarøktarfr. Hesi eru gomul og kunnu ikki eleverast, men serliga borðið hjá sjúkrarøktarfrr. er ikki hóskandi, og hevði veri sera gott at fingið nýtt borð sum skjótast.*
> ***Akuttrúm***. *-tosað hevur verði kommununi um umbygging/broyting av rúminum úteftir í ervað. Kommunan hava verið her og hugt eftir hølinum og hvørjar broytingar kunnu gerast. 1.august byrjaði nýggjur sjúkrarøktarfr., í starvi á læknamiðstøðini, ið ger at vit nú mangla hølir. Hon brúkar nú eini høli, sum áðrenn var akuttrúm. Sostatt er onki akuttrúm, og tað er nakað vit hava stóran tørv á.*
> *Nær kunnu vit vænta at hoyra meira ítøkiligt um umbygging/broytingar av hesum rúminum?*
> ***Heilsumiðstøð.*** *-hvørjar ætlaninir eru viðvíkjandi nýggju heilsumiðstøðini í miðbýnum? Nær fæst meira at vita hesum v.v.?*

**Lógargrundarlag:** Kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum broytt við kunngerð nr. 19 frá 21. mars 2017

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025 210, 14 kommunulæknin vørur & tænastur avsett kr. 323 tkr. -onkið avsett til íløgur.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan

**Sosiala nevnd 23. september 2025:**
Forkv. mælir til at heimila umsitingini at keypa 3. nýggj borð og stólar samsv. samsv. ynskjum og tørvi hjá starvsfólkunum, sum víst verður á í telduposti 17. sep. 2025. -fíggjingin verður játta av §210 -einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at heimila umsitingini at keypa 3. nýggj borð og stólar samsv. ynskjum og tørvi hjá starvsfólkunum, sum víst verður á í telduposti 17. sep. 2025. -fíggjingin verður játta av §210, sum eykajáttan. -Málið verður beint í býráðið.

**<u>Býráðið 29. september 2025:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialu nevnd og Fíggjarnevndini, og at fíggjingin verður játta av §210, sum eykajáttan

**<u>Býráðið 27. november 2025:</u>**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**90/25**
**25/00412-2 Tvøroyrar Fimleikafelag (TF) -umsókn um stuðul til útgerð og amboð 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.09.2025 | 79/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 84/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 110/25 |
| 4 Býráðið | 27.11.2025 | 90/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28.08.2025**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá Tvøroyrar Fimleikafelag.

Felagið skriva at:

> *Vit í Tvøroyrar Fimleikafelag eru sera spent at byrja fimleikaárið 2025/2026. Tvøroyrar Fimleikafelag vil við hesum søkja fíggjarligan stuðul til nýggja útgerð og amboð. Felagið tørvar nýggja, tíðarhóskandi útgerð. Tí loyva vit okkum at søkja um fíggjarligan stuðil til útgerð, ið fer at betra munandi um venjingarumstøðurnar og trygdina hjá okkara fimleikarum.: - Keyp av nýggjari Airtrack og aðrari útgerð til Airtrack - Keyp av luftmáttusetti - 14 deilir Kostnaðurin fyri útgerðina er kr. 126.633,75 og vit vilja hervið søkja Tvøroyrar Kommunu um hesa upphædd.*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Møgulig stuðulsjáttan skal av FÆ2025, §524 stuðul til ítrótt

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. september 2025:**
Einmælt samtykt at veita Tvøroyrar Fimleikafelag stuðult til keyp av Airtrack mátta o.a., samsv. teirra umsókn dagf. 28. aug. -Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at umsitingin vendir sær til Tvøroyrar Fimleikarfelag fyri at fáa at vita, um felagið hevur søkt um stuðul frá øðrum kommunum í Suðuroynni. Málið verður tikið til nýggja viðgerðar á næsta fundi í Fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Einmælt samtykt at lata 50.000 kr sum stuðul til keyp av nýggjari Airtrack og aðrari útgerð til Airtrack.

**Býráðið 27. november 2025:**
Eyð Eidesgaard mælir til eitt broytingaruppskot, at kommunan veitur stuðul á kr. 100.000,- til Tvøroyrar fimleikafelag.

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá Eyð Eidesgaard at veita stuðul á kr. 100.000,-**
**Atkvøtt verður:** 7/0/0 -**Uppskotið er samtykt einmælt**

**91/25**
**25/00413-2 TB-Flogbóltur -umsókn frá TB Flogbóltið, um stuðul til kappingarárið 2025/26**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.09.2025 | 80/25 |
| 2 Mentanarnevndin | 08.10.2025 | 82/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 111/25 |
| 4 Býráðið | 27.11.2025 | 91/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28.08.2025**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá TB-Flogbóti til kappingarárið 2025/26.

**Felagið skrivar at:**

*Vit hjá TB Flogbólti eru sera spent at byrja kappingarárið 2024/25.*

*TB-flogbóltur fylti 40 ár í fjør. Vit hava umleið 200 limir, íroknað hvílandi limir og leikarar frá 6 ára aldri til meistaradeildina. TB-flogbóltur hevur altíð lagt stóra orku í ungdómsarbeiðið. Hetta sæst aftur í okkara avrikum. Í farna kappingarári komu heili fimm av okkara liðum í FM finalu fyri yngri, harav tvey av liðunum vunnu. Í steypakappingini fyri yngri komu 3 lið í finaluna, og komu vit suður aftur við øllum trimum steypunum. Meistaradeildin kvinnur rukku eitt flott 4. pláss, og ætla vit okkum nógv longur upp komandi ár! Í ár halda vit eins og undanfarna ár fram við Ramasjang flogbólti, sum er fyri børn í aldrinum 3-5 ár.*

*Vit hjá TB-Flogbólti ynskja at halda fram við góðu gongdini, vit vilja tryggja okkum, at okkara evnaríku leikarar halda fram at íðka flogbólt, og at bæði leikarar og felag eru í støðugari menning. Til hettar tørvar okkum tykkara hjálp og fíggjarliga stuðul.*

*Okkara uppskot eru fylgjandi: - Fyri 50.000 kr. fáa tit stórt logo á allar leikarablusur hjá meistaradeildini. - Fyri 15.000 kr. fáa tit lítið logo á leikarablusir í meistaradeildini. - Fyri 20.000 kr. fáa tit reklamuskelti runt vøllin til heimadystir hjá meistaradeildini, ið allir verða vístir í sjónvarpinum. Reklamuskeltið er 3x1 metur.*

*Kostnaður av at framleiða reklamuskelti, logoframleiðsla og prent verður goldið av fyritøkuni ið stuðlar.*

*Tit kunnu sjálvandi eisini avgera upphæddina sjálvi, vit takka hjartaliga fyri allan stuðul, ið vit fáa. Tí uttan fíggjarligar stuðlar, og vælvild frá sjálvbodnum er sera torført at reka eitt ítróttarfelag.*

*Við vón um vælvild Vegna TB-flogbólt, Kristin Magnussen, forkvinna*

Upplýsast kann at TB-Flogbóltur hevur fingið í stuðul frá Tvøroyrar kommunu sum niðanfyri:

- 2020/21 kr. 130.000,-
- 2021/22 kr. 130.000,-
- 2022/23 kr. 130.000,-
- 2023/24 kr. 130.000,-
- 2024/25 kr. 130.000,-

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025, 524 20. Stuðul til ítrótt

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 08. september 2025:</u>**
Einmælt samtykt at veita Tvøroyrar Flogbóltsfelag stuðult á kr. 150.000,- til kappingarárið 2025/2026, samsv. teirra umsókn dagf. 28. aug. -Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**<u>Kommunustjórin 09. september 2025:</u>**
Málið verður lagt fyri mentanarnevndini til nýggja viðgerð, orskað av, at omanfyri málslýsing var fyri kappingarárið 2024-25.

Málslýsing fyri kappingar árið 2025-26 er henda:

Felagið skrivar at:

> *TB flogbóltur er eitt felag við umleið 130 íðkarum, har um 120 av teimum eru børn og ungdómar. Vit meta okkum verða eitt serligt felag, tí tað er bert hjá okkum, at tað ber til at íðka flogbólt í oynni, og eru vit so heppin, at vit eisini hava íðkarar úr Sandvík, Hvalba, Fámjin, Hovi, Porkeri, Vági og Sumba.*
>
> *Kappingarárið 24/25 eydnaðist sum heild væl. Tvey av okkara ungdómsliðum vórðu steypavinnarar. Vit vunnu 3 FM heiti í ungdómsdeildini, eins og okkara flogbørn (4.fl. og yngri) vunnu fleiri FM heiti, hesi verða tó ikki skrásett nakrastaðni. Fleiri av okkara ungu íðkarum fingu eisini heiðurin at verða kosin dagsins spælari eins og 4 av okkara íðkarum fingu landsliðsboð og umboðaðu Føroyar uttanlanda. Kvinnurnar hjá okkum spældu fleiri spennandi dystir og vunnu fleiri av hesum, men tað eydnaðist teimum tíverri ikki at vinna heiðursmerki. Komandi ár sær eisini spennandi út hjá kvinnunum, tí fleiri av okkara "gomlu" spælarum eru fluttir ella flyta heim, eins og vit hava ein útlendskan spælara í kikaranum.*
>
> *Vit í TB flogbólti eru serliga glað fyri, at tað er menning í felagnum. Fyrr hava vit sæð menning í flogbørnum og til U12, men í ár hava ungdómsliðini veruliga blómað, tey brenna fyri flogbóltinum. Tey møta væl upp til venjing, ja tímar áðrenn og sita og práta og vilja fegin hjálpa til, um tørvur er á hesum. Fleiri av teimum hava eisini dúgliga ferðast norðureftir til venjing á flogbóltsskúlanum hjá FBF.*
>
> *Vit hava altíð lagt dent á, at í okkara felagi skulu øll trívast og hava tað gott og sjálvandi læra at spæla flogbólt. Vit ynskja framvegis at skapa ein góðan og sunnan felagsskap millum okkara íðkarar, men vit ynskja eitt sindur meiri eisini! Vit ynskja, at okkara leikarar skulu mennast á einum hægri tekniskum stigi enn undanfarin ár, soleiðis at tey evnini, sum vit síggja í okkara felagi í dag kunnu røkka enn hægri í framtíðini.*

*Gongdin í felaganum á venjara økinum er dalandi. Fleiri av okkara góðu gomlu venjarum hava takkað fyri seg eftir nógv, nógv ár á baki, og tað hevur ikki verið eins nemt at finna nýggjar lokalar venjarar, sum duga at læra okkara íðkarar tekniska partin av flogbóltinum. Tó so eru allir okkara venjarar raskir og álítandi, og eru vit takksom, at teir seta sína tíð av til okkara felag. Men av tí, at vit vilja leggja dent á tann tekniska partin av flogbóltinum komandi kappingarár, hava vit leitað eftir einum høvuðsvenjara, sum skal menna okkara leikarar eins og geva okkara venjarum nøkur amboð í ryggsekkin til framtíðina.*

*Ikki tykkum at siga, so er kostnaðurin av øllum í dag hækkaður, og soleiðis er eisini, tá vit skulu keypa ein spælara og venjara, og alt sum fylgir við tí, til felagið.*

*Við viðfestu útrokningum fer raksturin av felagnum at kosta okkum væl meiri enn undanfarin ár, og tí vilja* ***vit søkja um ein væl hægri stuðul fyri kappingarárið 25/26.***

**<u>Mentanarnevndin 08. oktober 2025:</u>**
Umboð fyri TB Flogbólt møtti til fundin og greiddi frá um virksemið í felagnum. Fráboðað varð, at tað gongur væl í felagnum, og at fleiri lið eru til kapping, sum er jaligt fyri felagið og menningina av flogbólti í økinum. Felagið vísti á, at ynskið er at fáa ein útlendskan venjara, tí hetta hevði verið ein stórur styrkur fyri menningina av bæði leikarum og felagnum sum heild. Avbjóðingin hevur verið, at hetta er kostnaðarmikið, og tí hevur felagið áður ikki farið víðari við møguligum venjarum, tí kostnaðurin varð mettur at vera ov høgur. Kunna verður um, at felagið hevur eydnast við einari avtalu við ein venjara úr Ukraina fyri inniverandi kappingarár. Hetta verður mett at vera eitt stórt stig fram á leið, tí tað gevur møguleika fyri at menna venjingarnar og styrkja bæði leikara- og felagsligan trivnað.

**Forkv. í mentanarnevndini mælir til**, at broyta samtyktina hjá **Mentanarnevndini 8. September 2025**, og at veita ein stuðul á kr. 200.000,- -Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 05. november 2025:</u>**
Borgarstjórin og Alvi Mortensen samtykja at veita stuðul uppá somu upphædd sum undanfarna ár: 130.000 kr.
Bjarni Hammer heldur seg til tilmælið frá mentanarnevndini 8. oktober 2025.

**<u>Býráðið 27. november 2025:</u>**
**Kristin Michelsen, borgarstjóri** mælir til at samtykkja tilmælið hjá fíggjarnevndini at veita stuðul á kr. 130.000,- til TB Flogbólt.

**Barbara Tausen** mælir til at samtykkja tilmælið hjá mentanarnevndini at veita stuðul á kr. 200.000,- í stuðul til TB Flogbólt.

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá borgarstjóranum og fíggjarnevndini at veita stuðul á kr. 130.000,-**
Uppskotið er fallið við: 2/0/5
Fyri/ímóti/blankt
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Alvi Mortensen
**Ímóti:** Anita Vibergsdóttir, Barbara Tausen, Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer
**Blankt:** Arnfinn Bech

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá mentanarnevndini at veita stuðul á kr. 200.000,-**
Uppskotið er samtykt við: 5/0/2
Fyri/ímóti/blankt
**Fyri eru:** Barbara Tausen, Anita Vibergsdóttir, Eyð Eidesgaard, Arnfinn Bech og Bjarni Hammer
**Ímóti er:** Ongin
**Blankt:** Kristin Michelsen og Alvi Mortensen

**92/25**
**25/00448-2 Áhugafelagið “Nýggjárshaldið á Tvøroyri”**
**Umsókn um stuðul til nýggjárshald 2025/26**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.10.2025 | 86/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 113/25 |
| 3 Býráðið | 27.11.2025 | 92/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.09.2025**
Áhugafelagið “Nýggjárshaldið á Tvøroyri” hevur sent umsókn um stuðul til nýggjárshald 2025/26.

**Samanumtøka av umsókn:**
Áhugafelagið *“Nýggjárshaldið á Tvøroyri”* er stovnað fyri at endurreisast og menna nýggjárshaldið sum eitt felags trivnaðartiltak fyri sóknina – við denti á hugna og grønari gongd (tálg ístaðin fyri olju).

**Tiltøk:**
Víðka nýtsluna av tálgablikkum (upp í 450–500 blikk).
Menna og brand’a Oyrnafjalstúrin við faklartúri, felagssangi og hugnaløtu í skúlagarði.

**Stuðulsumsókn:**
Søkt verður um **50.000 kr.** til m.a.:

- Nýggja gassgrýtu (ca. 13.500 kr.), gass og supputilfar
- Tilfar til fakklar (ca. 6–7.000 kr.)
- Fýrverk (til Oyrnafjalstúrin og bálið)
- Tilfar til hugnaløtu í skúlagarðinum

**Vegna nevndina:**
Wivika Tjaldrastein Strøm

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Stuðul til mentan

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. oktober 2025:**
Bjarni Hammer og Anita Vibergsdóttir mæla til, at umsitingin vendir sær til áhugabólkar, ið ynskja at skipa fyri nýggjárshaldi í Tvøroyrar kommunu, áðrenn komandi býráðsfundin 30. oktober 2025.
Sum útgangsstøði verður mælt til, at hesir áhugabólkar samskipa eitt felags nýggjárshald í Trongisvági, har øll tiltøk í sambandi við fyriskipanina av nýggjárshaldinum – t.d. nýggjársbál, faklagongd, fýrverk o.a. – verða at fara fram í Trongisvági, við nýggjársbáli á sandinum og fýrverki o.l. nærhendis ítróttarhøllini.

Forkvinnan mælir til at veita stuðul á kr. 50.000,- til Áhugafelagið "Nýggjárshaldið á Tvøroyri", sambært umsókn um stuðul, dagfestari 11. september 2025. Somuleiðis verður mælt til, at heita á umsitingina um at venda sær til áhugabólkar, ið ynskja at skipa fyri nýggjárshaldi í Tvøroyrar kommunu fyrst í komandi ár 2026, soleiðis at hesir áhugabólkar, sum útgangsstøði, samskipa eitt felags nýggjárshald í Trongisvági í 2026. Og at øll tiltøk í sambandi við fyriskipanina av nýggjárshaldinum í 2026 – t.d. nýggjársbál, faklagongd, fýrverk o.a. – verða at fara fram í Trongisvági, við nýggjársbáli á sandinum og fýrverki o.l. nærhendis ítróttarhøllini. -Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Samtykt at lata fíggjarligan stuðul uppá 40.000 kr til Áhugafelagið "Nýggjárshaldið á Tvøroyri".

Mælt verður til, at fíggjarnevndin endurskoðar játtanina til nýggjárshaldið í kommununi.

Nevndin samtykkir, at heimila umsitingini at flyta uttandura fimleikaamboðini í Trongisvági til eitt annað hóskandi stað, og nýta núverandi økið til bálpláss.

**Býráðið 27. november 2025:**
**Kristin Michelsen, borgarstjóri** mælir til at málið verður beint aftur í nevnd orsakað av, at samsvar ikki er við fyriliggjandi umsókn og ætlanir.
**Atkvøtt verður:** 7/0/0 -**Uppskotið er samtykt einmælt**
Fyri/ímóti/blankt

**93/25**
**25/00446-1 Fíggjarætlan 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 76/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 61/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 123/25 |
| 4 Býráðið | 10.11.2025 | 75/25 |
| 5 Býráðið | 27.11.2025 | 93/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.09.2025**

Sambært kommunustýrislógini skal Fíggjarnevndin í seinasta lagi 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Tvøroyrar býráð hevur ásett, at fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður 29. september 2025, og onnur/endalig viðgerð verður áðrenn 1. desember 2025.

Tað eru tveir temadagar settir av til fíggjarætlanararbeiðið, har býráðslimir saman við umsiting viðgera rakstur og íløgur. Hesir eru tórsdagin 16. oktober og fríggjadagin 17. oktober, har raksturin og íløgurnar fyri 2026 verða gjøgnumgingin.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 20,9% og 8.000 kr.

Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu einans hækka, um talan er um:
- lógarbundin krøv,
- býráðssamtyktir, íroknað virksemisbroytingar sum fylgja av nýggjum íløgum,
- sáttmálabroytingar og líknandi.

**Viðgerðarætlan**
Mælt verður til, at fíggjarætlanin fyri 2026 verður viðgjørd soleiðis:
1. **29. september 2025**: 1. viðgerð av fíggjarætlanini, har ásett verður barnafrádráttur, skattaprosent, rakstur og íløguætlanir fyri 2026.
2. **Temadagar 16. oktober og fríggjadagin 17. oktober**, har raksturin og íløgurnar fyri 2026 verða gjøgnumgingin
3. **Áðrenn 1. desember 2025**: 2. viðgerð og endalig samtykt av fíggjarætlanini.

**Inntøkur:**
Inntøkurnar komandi ár eru mettar til knappar **kr. 73 mió.** Tær hava støði í uppgerðum, sum FMR og Taks sendu út fyrst í september, og lønarvøkstur á arbeiðsmarknaðinum.

**Lyklatøl (metingar)**

- Skattainntøkur fyri 2026: **Kr. 72.968.322,-**
  *(Skattainntøkur fyri 2025: kr. 69.908.177,-)*

*Hetta grunda á ein kommunuskatta á 20,9% og eftir barnafrádrátt á kr. -8.000,-*

**Fólkatal aug. 2024/2025: 1759/1734 *(-25)***
Fólkatalið í Tvøroyrar kommunu er minkað seinasta árið. Í august 2024 búðu 1.759 fólk í kommununi, men í august 2025 var talið fallið niður á 1.734. Tað svarar til ein minking upp á 25 fólk – ella umleið 1,4 %.

Samstundis er samlaða fólkatalið í Føroyum vaksið. Í august 2024 búðu 54.769 fólk í landinum, og í august 2025 var talið komið upp á 55.146. Tað merkir ein vøkstur upp á 377 fólk – ein øking á umleið 0,7 %.

Í Tvøroyrar kommunu búðu í aug. 2024 umleið 3,2 % av samlaða fólkatalinum í Føroyum, men hetta lutfallið var í aug. 2025 lækkað til umleið 3,1 %.
*(Sí viðheftu tabellir)*

Skattagrundarlag:

- A-inntøka: kr. 386.747.930,-
- B-inntøka: kr. 18.626.700,-
- FAS-inntøka: kr. -6.298.957,-
- Inntøkufrádráttur: kr. -329.589,-
- Sjómannafrádráttur: kr. -1.284.613,-
- Botnfrádráttur: kr. -40.160.800,-

Kommunalt skattagrundarlag: kr. 363.599.628,-

- Kommunuskattur (20,9%): kr. 75.992.322,-
- Barnafrádráttur (378 x 8.000 kr.): kr. -3.024.000,-
  *(Børn 2025: 386)*

Nettoskuldin í mun til álíkning var við árslok 2024, 34% av einari álíkning. Láni møguleikarnir hjá kommununi vóru tískil við árslok 2024 umleið 73 mió. kr.

Samlað skuld í mun til álíkning
Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| **Gongd útjavningarkonto/nettoskuld og lániloft árini 2020 - 2024** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** |
| ***Útjavningarkonto/nettosskuld*** | ***38.258*** | ***36.955*** | ***38.156*** | ***35.850*** | ***36.815*** |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | | | | | |
| Kommunuskattur inntøka | 75.954 | 72.935 | 71.223 | 67.967 | 65.571 |
| Kommunuskatta % | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% |
| ***Álíkning umroknað 23%*** | ***83.586*** | ***80.263*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| Skattur eftirlønargjald | 23.207 | 21.049 | 0 | 0 | 0 |
| Afturbering DIS, FAS o.a. | 4.845 | 4.895 | 0 | 0 | 0 |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | ***111.638*** | ***106.207*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| ***Nettoskuld %*** | ***34%*** | ***35%*** | ***49%*** | ***48%*** | ***51%*** |
| ***Lánimøguleikar*** | **73.380** | **69.253** | **40.224** | **38.946** | **35.344** |

Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum. Í 2023 blivu reglurnar viðvíkjandi útrokning av nettoskuld í mun til álíkning broyttar, soleiðis at frameftir eisini verður tikið hædd fyri tí, sum kommunan fær viðvíkjandi skatti av eftirlønargjøldum og afturbering av DIS, FAS o.a.

Nettoskuldin í mun til álíkning er við árslok 2024 34% av einari álíkning. Lánimøguleikarnir hjá kommununi eru tískil við árslok 2024 umleið kr. 73. mió.

**Tvøroyrar kommuna hevur í inniverandi ári upptikið lán á 15 mió, til ma. keypa og dagføringar av bygninginum á Sjógøtu 2-4.**

**Yvirlit fyri rakstrarroknskap seinastu 5 árini**

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir inntøkurnar síðstu 5 árini:

| *(1.000 kr.)* | **FÆ2026** | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | (2025) | 78.997 | 75.556 | 74.256 | 70.020 | 68.315 | |
| Ætlan | 72.968 | 68.510 | 70.469 | 65.581 | 64.380 | 61.572 | |
| Munur | | 10.487 | 5.087 | 8.675 | 5.640 | 6.743 | |
| Skattaprosent | | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | |
| | | | | | | | |
| Manntal | 1.734 | 1.732 | 1.747 | 1.767 | 1.771 | 1.747 | |
| Inntøka pr. fólk | 43,7 | 45,6 | 43,2 | 42 | 39,5 | 39,1 | |
| | | | | | | | |
| Inntøka umroknað til skattskyldug | | 377.976 | 361.512 | 355.292 | 335.024 | 326.866 | |
| Inntøka pr. fólk | | 218 | 207 | 201 | 189 | 187 | |
| Broyting í árinum | | 5,46% | 2,92% | 6,29% | 1,11% | 4,79% | |

**Lógargrundarlag -***Kommunustýrislógin*
§ 39. Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.
Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember

**Fíggjarligar avleiðingar**
Fíggjarætlanin er grundarlagið undir rakstri og íløgum hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2026.

**Tilmælið**
Uppskot til fíggjarkarm fyri 2026 verður hervið lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla býráðnum – umvegis Fíggjarnevndina – til at:

1. Áseta skattaprosent og barnafrádrátt galdandi fyri fíggjarárið 2026.
2. At nevndirnar viðgera hvør í sær á nevndarfundi í oktober ynskir til fíggjarætlanina fyri 2026. Hesi ynskir verða síðani viðgjørd á felags temadegi 16.–17. oktober, har seinasta hond verður løgd á raksturin og íløgurnar fyri 2026.
3. Onnur og endaliga viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður løgd fyri býráðið til samtyktar í seinasta lagi 1. desember 2025.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið uppskot til fíggjarætlan fyri 2026, og tekur einmælt undir við fyriliggjandi uppskotið. Fíggjarnevndin mælir til at skattaprosentið verður 20,9% og at barnafrádrátturin verður kr. 8.000,- eins og undanfarna ár. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2025:**
Býráðið samtykkir einmælt við fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 at áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttin til kr. 8.000,- eins og undanfarna ár. Harumframt varð avgjørt, at temadagar verða í býráðssalinum á Tvørávegi 37 tann 16.–17. oktober, har býráðslimir og leiðandi starvsfólk í umsitingini áseta játtanir til rakstur og íløgur fyri 2026. Onnur viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður løgd fyri býráðið tann 27. november 2025.

**Kommunustjórin 20. oktober 2025:**
Á temadegi 16. okt. har allir býráðslimir saman við kommunustjóra, fíggjarleiðara og leiðara av tekniskudeild og starvsfólkum í umsitingini, bleiv fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommunu 2026 viðgjørd.

Viðgerðin tók støðið í samtyktini á býráðsfundinum 29. september 2025, har karmarnir fyri inntøkumetingar, skattaprosent og frádráttir vóru lagdir sum grundarlag fyri rakstur og íløgur fyri 2026, umframt tilfar við tilmælum frá stovns- og deildarleiðarum hjá Tvøroyrar kommunu.

Á temadøgum var semja um, at skattaprosentið verður eins og undanfarna ár, 20,9%. At Barnafrádrátturin framhaldandi verður kr. 8.000,-. At hildið verður áfram við at lata virðiskort á kr. 2.000, til øll børn í Tvøroyrar kommunu, ið kunna brúka sum ískoyti til luttøku til mentan- og ítróttar tiltøk.

Á temadøgunum var semja um at avseta kr. 34,5 mió til íløgur 2026, í mun til 33,8 mió 2025, og at avsett til rakstur kr. 94,2 mió. í mun til 88,5 í 2025.

At barnaansingargjaldið verður framhaldandi tað sama fyri vøggustovu- og barnagarðspláss kr./mnd. 1.900,-, annað barnið kr./mnd. 1.600,- og ókeypis fyri triðja barni og hareftir. Gjaldið fyri fyrsta barni í frítíðarskúlanum verður framhaldandi kr. 1.200,-/mðr., og goldið verður fyri 11 mðr. Forskúlagjøldini verða tey somu, tvs. fyri fyrsta barni verður goldið kr. 700,-/mðr. og goldið verður fyri 11 mðr. Avsláttur verður latin javnbjóðis galdandi avsláttarskipan fyri barnaansingina.

Inntøkurnar av persónsskatti 2026 eru mettar til kr. 72.4 mió, samanborði við 2025, á kr. 69,9 mió. Inntøkur av partafelagsskatti 2026 verða mettar til kr. 2,5 mió.

**Rakstur 2025/2026:**

| | FÆ2025 Rakstur | FÆ2026 Rakstur | |
|---|---|---|---|
| §1 | 12,093,660 | 12,568,681 | 475,021 |
| §2 | 36,265,823 | 39,556,943 | 3,291,120 |
| §3 | 17,110,864 | 16,433,634 | -677,230 |
| §4 | 8,885,844 | 8,890,264 | 4,419 |
| §5 | 10,629,013 | 10,150,853 | -478,160 |
| §6 | 5,582,231 | 5,677,579 | 95,349 |
| §6 | -5,950,000 | -2,950,000 | 3,000,000 |
| §7 | 3,928,093 | 3,953,505 | 25,411 |
| | 88,545,528 | 94,281,459 | 5,735,931 |

**Íløgur ætlanin 2025/2026:**

| | FÆ2025 Íløgur | FÆ2026 Íløgur | |
|---|---|---|---|
| §1 | 1,150,000 | 233,000 | -917,000 |
| §2 | 200,000 | 0 | -200,000 |
| §3 | 5,150,000 | 3,500,000 | -1,650,000 |
| §4 | 7,182,700 | 3,400,000 | -3,782,700 |
| §5 | 230,000 | 1,350,000 | 1,120,000 |
| §6 | 15,900,000 | 15,300,000 | -600,000 |
| §7 | 4,015,000 | 3,420,000 | -595,000 |
| | 33,827,700 | 27,203,000 | -6,624,700 |

**Fíggjarætlanin 2026 javnvigar við eina álíkning á 0,53**

**Tilmælið 20.10.2025:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið umvegis fíggjarnevndina, býráðnum til aðru og endaligu viðgerð og samtykt.

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, og málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 10. november 2025:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri mælir til at málið verður útsett til býráðsfundin 27. november. -Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 24.11.2025:**
Borgarstjórin hevði innkalla allar býráðslimir til arbeiðsdag 24. nov, fyri at taka saman um og endurskoða fíggjarætlanar uppskot fyri 2026. Skoti var upp at fremja smávegis tillagingar samanborðið við semjuna av temadagnum 16. okt. 2025. Arnfinn Bech, hevði forfall og møtti ikki til henda fundin, men hevur lagt fram ynskið til borgarstjóran um at avsett verður kr. 150.000,- til forprojekt at kanna og lýsa tað siðsøguliga við kolagrevstri, linjubana og smiðju í Rangabotni. Borgarstjórin hevur vent seg til býráðslimir, sum taka undir við hesar ætlan.

Tillagað uppskot til fíggjarætlan 2026 «FÆ2026 Tvøroyri 24.11.25» er viðheft, og eru broytingarnar í høvðusheitinum hesar:

Ongin broyting er viðv. skattaprosentinum, sum verður tað sama og undanfarna ár, 20,9%. Semja var um at hækka barnafrádráttin úr kr. 8.000,- til kr. 10.000-,. Hildið verður áfram við at lata virðiskort á kr. 2.000, til øll børn í Tvøroyrar kommunu, ið kunna brúkast sum ískoyti til luttøku til mentan- og ítróttar tiltøk.

Semja var um at avseta kr. 38,6 mió til íløgur 2026, í mun til 33,8 mió 2025, og at avseta til rakstur kr. 95,8 mió. í mun til 88,5 í 2025. *-Vøksturin stavar í høvuðsheitum frá øktari játtan til BHS, og lønarvøkstri samsv. sáttmálum.*

At barnaansingargjaldið verður framhaldandi tað sama fyri vøggustovu- og barnagarðspláss kr./mnd. 1.900,-, annað barnið kr./mnd. 1.600,- og ókeypis fyri triðja barni og hareftir. Gjaldið fyri fyrsta barni í frítíðarskúlanum verður framhaldandi kr. 1.200,-/mðr., og goldið verður fyri 11 mðr. Forskúlagjøldini verða tey somu, tvs. fyri fyrsta barni verður goldið kr. 700,-/mðr. og goldið verður fyri 11 mðr. Avsláttur verður latin javnbjóðis galdandi avsláttarskipan fyri barnaansingina.

Inntøkurnar av persónsskatti 2026 eru mettar til kr. 74.9 mió, samanborið við 2025, á kr. 69,9 mió. Inntøkur av partafelagsskatti 2026 verða mettar til kr. 2,5 mió. Inntøkur tóm býlir kr. 0,5 mió. *(nýtt)*

**Størstu broytingar millum temadagin 16. nov. til arbeiðsdagin 24. nov. eru:**

- **Barnafrádrátturin er: kr. 10.000,- *(broyting frá kr. 8.000,-)***
- **Raksturin er øktur við: kr. 1,5 mió.**
- **Íløgur eru øktar við: kr. 11,6 mió.**

**Rakstur ætlan 2025/2026 Dagf. 24.11.**

| | FÆ2025 Rakstur | FÆ2026 Rakstur | |
|---|---|---|---|
| §1 | 12,093,660 | 12.863.179 | 769.519 |
| §2 | 36,265,823 | 39.973.858 | 3.708.036 |
| §3 | 17,110,864 | 16.433.634 | -677.230 |
| §4 | 8,885,844 | 8.890.264 | 4.419 |
| §5 | 10,629,013 | 10.150.853 | -478.160 |
| §6 | 5,582,231 | 5.677.579 | 95.349 |
| §6 | -5,950,000 | -2.450.000 | 3.500.000 |
| §7 | 3,928,093 | 4.253.505 | 325.411 |
| | 88,545,528 | 95.832.872 | 7.287.344 |

**Íløgur ætlanin 2025/2026: Dagf. 24.11**

| | FÆ2025 Íløgur | FÆ2026 Íløgur | |
|---|---|---|---|
| §1 | 1,150,000 | 233,000 | -917,000 |
| §2 | 200,000 | 0 | -200,000 |
| §3 | 5,150,000 | 3,600,000 | -1,650,000 |
| §4 | 7,182,700 | 3,400,000 | -3,782,700 |
| §5 | 230,000 | 1,850,000 | 1,620,000 |
| §6 | 15,900,000 | 24,550,000 | 8.650,000 |
| §7 | 4,015,000 | 4,920,000 | 905,000 |
| | 33,827,700 | 38.553.000 | -6,624,700 |

| 2025 ultimo | 2026 | |
|---|---|---|
| -8.872.650 | -7.528.330 | Úrslit av Rakstri |
| 3.674.000 | 4.545.361 | Avdráttir lán |
| -19.000.000 | -25.000.000 | Útvegan lán |
| 33.837.700 | 38.553.000 | Løgur |
| 9.629.050 | 10.570.032 | Kassaúrslit |

**Samsv. uppskot til fíggjarætlan dagf. 24. nov. 2025, javnvigar fíggjarætlanin 2026 við álíkning á 0,58**

**<u>Býráðið 27. november 2025:</u>**
Einmælt og endaligt samtykt við aðru viðgerð.

## 94/25
## 25/00529-1 FÆ2025 -Eykajáttanir flytingar millum íløgu- og rakstrarstøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.11.2025 | 94/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 25.11.2025**
Fíggjardeildin hevur pr. 24. nov. 2025 gjørt upp yvirlit yvir játtanir FÆ2025 og realisera kostnað á rakstrarstøðum. Avgjørt hevur verði at fremja umraðfestingar í avsetingunum til løgur og rakstur og er tí neyðugt við flytan av játtan á rakstrarstøðum. Neyðugt hevur verði við hægri rakstrarjáttan á einkultum rakstrarstøðum, eins og minni nýtsla hevur verði á summum rakstrarstøðum.

Eykajáttanirnar eru metingar hjá fíggjarleiðara og kommunustjóra og eru grundaðar á fyriliggjandi uppgerð, og verða allar umraðfestingar játtaðar innan fyri sama rakstarstað.

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til, at fíggja eykajáttan innan fyri verandi fíggjarkarm við flytingum av játtanum innan hvørja grein sær, samsvarandi niðanfyri yvirlit *"Eykajáttanir 2025"*. -Málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin
**§ 41.** Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

*Stk. 2.* Kommunustýrið kann tó um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

*Stk. 3.* Hevur kommunustýrið sambært lóg ella aðrari bindandi rættarreglu skyldu til at bera útreiðslurnar av ávísum tiltøkum, kann hetta setast í verk uttan játtan frammanundan, men játtan skal tá skjótast gjørligt fáast frá kommunustýrinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2025 -flytan millum íløgu og rakstarjáttanir

**Eykajáttanir 2025**
**Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til at flyta:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 214 Tannrøkt | Rakstur | 400.000 | Eyka tannlækni + keyp |
| 230 Bú- og Heimatænastan | Rakstur | 2.200.000 | Eykarokning |
| 300 Pakkhús 4 | Rakstur | 300.000 | Eyka opið vikuskifti |
| 317 Spælipláss | Løga | 300.000 | Løga Froðba |
| 525 FSR | Løga | 65.000 | Meiri løga (er samtykt fyrr) |
| 529 Bygda- og Sjóvinnusavn | Løga | 500.000 | Pakkhús 18 |
| 526 Bókasavnið | Rakstur | 15.000 | Keyp |
| 530 Svimjihøll | Rakstur | 75.000 | Løn |
| 532 Ítróttarhøllin | Rakstur | 30.000 | Keyp |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 536 Ítróttardepilin | Rakstur | 140.000 | Umvæling |
| 537 Ítróttardepilin | Løga | 40.000 | Keyp |
| 609 Bygningar | Løga | 4.000.000 | Keyp sjógøta 2 |
| 613 Ídnaðarøkir | Løga | 200.000 | Keyp |
| 614 Fríðkan | Rakstur | 150.000 | Løn |
| 618 Kirkjugarð | Rakstur | 50.000 | Løn og keyp |
| 624 Vegir | Rakstur | 150.000 | Løn og keyp |
| 625 Vegir | Løgur | 2.500.000 | Asfaltering |
| 626 Gøtuljós | Rakstur | 70.000 | Keyp |
| 628 Maskinur & bilar | Rakstur | 85.000 | Keyp |
| 629 Maskinur & bilar | Løgur | 550.000 | Bil |
| 634 Gøtur | Rakstur | 120.000 | Løn |
| 722 Talgildu Føroyar | Rakstur | 60.000 | Keyp |
| 820 Rentur | Rakstur | 30.000 | Meiri rentur |
| | | **12.030.000** | **íalt** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 310 Barnagarður | Rakstur | -1.000.000 | Minni lønir og keyp |
| 314 Ung í arbeiði | Rakstur | -75.000 | Minni løn |
| 411 Skúlin | Løgur | -3.500.000 | Minni løga |
| 533 Ítróttardepilin | Løgur | -100.000 | Minni løga |
| 610 Bygningar | Rakstur | -500.000 | Minni rakstur |
| 615 Bygging | Løgur | -100.000 | Minni løgur |
| 619 Kirkjugarð | Løgur | -2.800.000 | Minni løgur |
| 621 Vatn | Løgur | -1.500.000 | Minni løgur |
| 623 Kloakk | Løgur | -2.000.000 | Minni løgur |
| 715 Brunaumsjón | Løgur | -455.000 | Søla |
| | | **-12.030.000** | **í alt** |

**Tilmælið:**
Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til at veita eykajáttan og fremja flytingar millum kontostøð á FÆ2025, samsv. niðanfyri. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 27. november 2025:**
Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. -málið skal hava tvinnar viðgerðir

**95/25**
**25/00530-1 Býráðsfundir -fundardagar í 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.11.2025 | 95/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 25.11.2025**
Mælt verður til at hava býráðsfundir samb. niðanfyri skrá.

| Jan. | Feb. | Mar. | Apr. | Mai | Jun |
|---|---|---|---|---|---|
| Tór. 29 | Tór. 26 | Tór. 26 | Tór. 30 | Tór. 28 | Tór. 25 |

| Jul. | Aug. | Sep. | Okt. | Nov. | Des. |
|---|---|---|---|---|---|
| ongin | ongin | Óns. 30 | Tór. 29 | Tór. 26 | Tór. 17 |

## Býráðsfundir

Býráðsfundir eru vanliga eina ferð um mánaðin, -*vanliga seinasta tórsdag í hvørjum mánaði*-. Býráðsfundir vera vanliga hildnir í býráðssalinum á kommunuskrivstovuni, á Tvøravegi 37, kl. 17.00 um ikki onnur fráboðan verður kunngjørd.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum býráðsfundurin er.

Umframt regluligu býráðsfundirnar kann býráðið halda eykafundir, tá ið støða skal verða tikin til týdningarmikil mál, sum hava skund. Juli og august heldur býráðið vanliga summarfrí.

## Lógargrundarlag:

Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018 (Kommunustýrislógin) Kapittul 3, Kommunustýrisfundir

- *§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir skulu vera ásettar í fundarskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. Stk. 2. Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.*

## Tilmæli:

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 27. november 2025:**
Einmælt samtykt

**97.1/25**
**25/00138-20 Umsókn um byggiloyvi til trafostøð í Froðba - frávik frá byggisamtyktini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.11.2025 | 97.1/25 |

**Málslýsing:**
SEV hevur søkt um loyvi at byggja trafostøð á matr. nr. 52a í Fróðba.
Talan er m.a. um at gera streymveiting til aliútgerð hjá Bakkafrost.
Matr. nr. 52a liggur í fríøki, og kommunan hevur áður peikað á eitt øki í Víkargerði, men SEV fastheldur, at tað er neyðugt at fara longur út.

**Lógargrundarlag:**
Byggisamtyktin § 10 Undantaksloyvi

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kommunan hevur skyldu til at lata lendið til transformarastøðir og til vegir til støðirnar.

**Tilmælið:**
Mælt verður til at geva byggiloyvi við fráviki (undantaksloyvi), treytað av, at transformarastøðin verður bygt inn í lendið, við flagtekju og sjónligi parturin verður klæddur við lagaðum gróti.

**Býráðið 27. november 2025:**
Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd

**Til kunningar**

## 30/25
## 25/00029-1 Skattainntøkur 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2025 | 4/25 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 2/25 |
| 4 Býráðið | 27.02.2025 | 4/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 3/25 |
| 6 Býráðið | 31.03.2025 | 7/25 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 6/25 |
| 8 Býráðið | 01.05.2025 | 12/25 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 7/25 |
| 10 Býráðið | 02.06.2025 | 15/25 |
| 11 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 8/25 |
| 12 Býráðið | 29.09.2025 | 23/25 |
| 13 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 11/25 |
| 14 Býráðið | 10.11.2025 | 28/25 |
| 15 Býráðið | 27.11.2025 | 30/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2025**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2024/2025

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025/2026

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 01. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 10. november 2025:**
Málið var umrøtt og kannað

**Býráðið 27. november 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**31/25**
**25/00445-1 Cruise-ferðavinna - ferðamannaskip**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 23.09.2025 | 23/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 90/25 |
| 3 Býráðið | 29.09.2025 | 72/25 |
| 4 Býráðið | 10.11.2025 | 85/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 12/25 |
| 6 Býráðið | 27.11.2025 | 31/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.09.2025**
Tvøroyrar kommuna ynskir at styrkja ferðavinnuna, har í eisini at gera Tvøroyri meira áhugavert fyri ferðamannaskip.

Umboð fyri kommununa hava luttikið á Cruise-messu í Hamburg í september 2025, har fundir vórðu hildnir við altjóða aktørarar á økinum. Nakrir av aktørunum hava víst stóran áhuga fyri at hava Tvøroyri við sum eina nýggja destinatión í teirra rutum, og hevur kommunan eftirfylgjandi havt fundir við áhugaðir aktørarar, sum ynskja at vitja Tvøroyri.

Umsitingin søkir tí heimild til, at arbeiða víðari saman við hesum aktørum, so møguleikarnir kunnu mennast til ítøkilig átøk fyri at fáa fleiri ferðamannaskip og fleiri ferðafólk til Tvøroyri.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mælt verður til, at játtan verður veitt av FÆ2025, §719, íløgur í Tvøroyrar Havn, og um mett neyðugt við eykajáttan.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið vinnu- og havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 23. september 2025:**
Nevndin mælir til, at umsitingin fær heimild til at arbeiða víðari við hesum málinum. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 26.09.2025**
Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til at Tvøroyrar kommuna tekur av avtaluni við Nordic Port Group AB, og at umsitingin fær heimild at arbeiða víðari samsvarandi hesa avtaluna.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá borgarstjóra og kommunustjóranum at taka av fyriliggjandi avtaluni við Nordic Port Group AB, og at avtalan verður fíggja við eykajáttan av §721 “Íløga Bátahavnin”. Borgarstjórin kunnar um, at umboð fyri Nordic Port Group AB vitja á Tvøroyri tórsd. 13. november og eru her til sunnudagin 16 november. Mælt verður til, at allir býráðslimir møtast við umboðum frá Nordic Port Group AB, t.d. fríggjadagin 14. nov. í SALT. -Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 29. september 2025:**
Býráðið samtykkir einmælt tilmælið hjá Fíggjarnevndini, borgarstjóranum og kommunustjóranum um at taka av fyriliggjandi avtaluni við Nordic Port Group AB, og at avtalan verður fíggjað við eykajáttan av §721 “Íløga bátahavnin”.

**Býráðið 10. november 2025:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Kommunustjórin 18.11.2025:**
Tvøroyrar kommuna og Nordic Port Group undirskrivaðu samstarvsavtalu í SALT fríggjadagin 14. november.

**Fíggjarnevndin 20. november 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 27. november 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 19:15

______________________________
Kristin Michelsen

______________________________
Anita Vibergsdóttir

______________________________
Alvi Mortensen

______________________________
Barbara Michalina Tausen

______________________________
Bjarni Hammer

______________________________
Eyð Jóna Eidesgaard

______________________________
Arnfinn Bech